Todi framvegis í bíðirøðini

Dystir um vikuskiftið

1. deild menn

01.09	TB–GÍ	Birgir Sondum
01.09	B68-B36	Jens Petur Brattalíð
01.09	HB-VB	Niklas á Líðarenda
01.09	Skála-NSÍ	Páll Augustinussen
02.09	EB/S-KÍ	Petur Skarðenni

2. deild menn

31.08	B71-ÍF	Petur Skarðenni
31.08	B36-VB	Eiler Rasmussen
31.08	Sumba-KÍ	Regin Egholm
31.08	LÍF-HB	Jón Kári Frederiksen
31.08	NSÍ-FSV	Tummas Pauli Olsen

3. deild menn

01.09	AB-B71	Ransin N. Djurhuus
01.09	TB-GÍ	Eyðun Kjærbo
01.09	B68-B36	Edvard Højgaard
01.09	HB-ÍF	Kristoffur Vidtfeldt
01.09	Royn-FSV	Marlon Kjærbo

1. deild kvinnur

01.09	B36-KÍ	Kristoffur Vidtfeldt
01.09	Skála-B68	Dan Højgaard
01.09	GÍ-HB	Jan Gardar

Hóast hann fleiri staðni kann lesa, at hann átti at talst millum teir fyrstu ellivu hjá FCK, so má Todi í løtuni lata sær lynda leiklutin sum skiftisleikari

sosialurin 1 sosialurin

Í Georgia slapp føroyski álopsmaðurin upp í part síðsta korterið, tá hann staðfesti sigurin, sum ger, at FCK framvegis er við í europeisku kappingini

EUROPA CUP
Jóannes Hansen

Í morgin verður stóri dysturin í superliguni, tá FCK fer at spæla í Aalborg. Sjálvandi verður Todi Jónsson við í FCK ferðalagnum, men tað er langt frá víst, at hann verður ímillum teir fyrstu ellivu. Tað er meiri sannlíkt, at hann verður á beinkinum.

Hóskvøldið var FCK í Georgia, har teir við 4–1 sigri staðfestu samlaðan 7–2 sigur á Lokomotiva Tiblisi í UEFA kappingini.

Í vikuni hava vit fleiri ferðir nevnt, at tað var rættuliga sannlíkt, at Todi Jónsson fór at fáa møguleikan frá fyrsta bríksli í Georgia. Men soleiðis var tað ikki. Hóast Todi Jónsson skoraði tvey av teimum trimum málunum í dystinum í Keypmannahavn, so var avgerðin hjá venjaranum, at Zuma og Peter Møller skuldu vera í álopinum frá fyrsta bríksli. Tá annar hálvleikur var eitt korter gamal, varð Jörgen Petterson skiftur inn fyri Peter Møller, og tá eitt lítið korter var eftir, kom Todi Jónsson á vøllin fyri Zuma. Harvið kundi enn eina ferð staðfestast, at Todi Jónsson varð roknaður sum fjórði maðurin til tey bæði álopsplássini hjá FCK.

– Eg dugdi einki at meta um møguleikarnar, hvør fór at vera í álopinum. Tað var ikki fyrrenn í Georgia, at venjarin segði okkum liðið. Á hesum støðinum nyttar einki at vera vónbrotin. Tað ræður um at vera klárur og at gera sítt besta, tá tú fært møguleikan og so at vóna, at tað er nóg mikið at sannføra venjaran um, at tú eigur fyrsta rætt, heldur Todi Jónsson.

Hóskvøldið varð Todi settur á vøllin fyri Zuma, tá eitt lítið korter var eftir. Tá var støðan 3–1 til FCK, og Todi gjørdi tað, sum ein álopsspælari skal gera. Hann skoraði til 4–1, tá nníggju minuttir vóru eftir.

– Eg elti eina langa sending. Málverjin og aftasti verjumaðurin misskiltu hvønn annan. Bólturin fór framvið málverjanum. Eg var fyrri á honum enn verjuspælarin, og hóast vinkulin var ógvuliga spískur, so eydnaðist tað at fáa bóltin í málið, sigur Todi Jónsson.

Jörgen Petterson kom á vøllin fyri Peter Möller, tá ein tími var farin. Tá var støðan 1–1. Tað var skjótt, at svenski álopsmaðurin hevði skorað tvey mál – hann brúkti sjey minuttir til tað – og harvið styrkti hann um sína støðu undan dystinum í Aalborg. Bæði málini hjá Jörgen Petterson komu eftir smáspæl í brotsteiginum hjá mótstøðuliðnum.

FCK menninir gjørdust annars ikki so lítið skakkir, tá heimaliðið longu eftir nníggju minuttir legði seg á odda 1–0. Harvið var samlaða støðan 3–2 til FCK, men heimaliðið hevði skorað eina ferð á útivølli, og harvið skuldu teir bara skora eina ferð afturat, so vóru tað teir, ið fóru at halda fram í kappingini.

So var tað, at Zuma í 24. minutti javnaði til 1–1 og harvið hvarv spenningurin. Eftir gott uppspæl kom Zuma einsamallur ímóti málverjanum, og tá er hann sera tryggur.

Í 2. hálvleiki nýtti FCK venjarin møguleikan at seta tveir hvíldar og góðar álopsspælarar á vøllin, og teir avgjørdu. At Jörgen Petterson skoraði tvey mál ber ivaleyst í sær, at hann er favorittur til annað plássið í FCK álopinum í Aalborg í morgin. Zuma er sjálvskrivaður til hitt álopsplássið.

Spurningurin er so, um tað verður Todi Jónsson ella Peter Møller, sum fer at fáa møguleikan sum fyrsti skiftisspælari.

Skála-NSÍ:

Lokaluppgerð millum topp og botn

Runavíkingar skulu vinna, um oddasessurin skal varðveitast, men tað verður neyvan lætt í grannauppgerðini móti stigahungrandi skálamonnunum

UPPTAKT
Jákup Mørk

Tað er einki at ivast í, at fótbóltsfepurin í Runavíkini fær nøkur stig eyka, fyri hvørt umfar, sum gongur. Síðani summarsteðgin hevur liðið riggað sum ein vælsmurd maskina, og fyribils er oddasessurin eitt úrslit av hesum.

Runavíkingar eru tó greiðir um, at skal oddasessurin varðveitast, so verður helst neyðugt við einum sigri sunnudagin, og so er av álvara klárt til oddabrakið, tá HB kemur á vitjan í 15. leikumfarinum.

Landsliðsleikarin, Helgi L. Petersen, hevur drigist við skaða seinastu tíðina, men nú er líkt til, at hann aftur er førur fyri at spæla

Hungra

Á Skála er støðan ein heilt onnur. Liðið hevur nú 13 dystir í bestu deildini á baki, men enn vantar teimum fyrsta sigurin, og einki er at ivast í, at teir leggja nógv fyri, nú grannauppgerðin stendur á skránni.

Sum uppflytari er lagnan ofta tung, og hjá Skála hevur hon neyvan verið lættari av skaðunum, sum hava rakt liðið. Nú røkist tó fyri, at flestu av skaddu monnunum verða tøkir aftur, og á Skála rokna tey við, at Dánjal Hansen verður tøkur, eftir at hann annars hevur drigist við drúgvan skaða í fótliðinum. Hartil eru Kári Nielsen og Gheorghe Callo tøkir aftur eftir leikbann, so hópurin er á leið so sterkur, sum tað á nakran hátt er gjørligt.

Og tað verður helst eisini neyðugt móti »vespunum« hinumegin fjørðin. Runavíkingar tykjast ikki hava nakrar ætlanir um at steðga á, og líkt er eisini til, at hópurin nú er styrktur í mun til seinasta vikuskiftið.

Tað ferðina vóru hvørki Pól Thorsteinsson ella Helgi L. Petersen við vegna skaða, men ætlandi eru teir báðir við sunnudagin. So verður spurningurin, hvussu hjálparvenjarin á landsliðnum finnur pláss til tveir landsliðsleikarar, men tað má so av sonnum sigast at vera ein luksus-trupulleiki av teimum heilt stóru.

TB-GÍ:

Eyðmýkingin skal gloymast

Gøtumenn saknað í øllum førum tveir týðandi leikarar, tá teir á Sevmýru skulu vaska eyðmýkingina á Tórsvølli av sær

UPPTAKT
Jákup Mørk

Tað er einki at ivast í, at Gøtumenn eru særdir, tá teir sunnudagin fara til Tvøroyri. Stórtapið fyri Hajduk Split er hitt størsta hjá føroyskum felagi á heimavølli, og fyri ærukæru GÍ-leikararnar er einki at ivast í, at hetta vilja teir ikki hava sitandi á sær.

Tí er einki at ivast í, at tvørámenn møta einum vælmentendraðum GÍ liði, men tað kunnu teir sum so ikki taka atlit til.

TB hevur nevnliga sítt egna stríð, har tað ræður um at halda skálamenn aftan fyri seg, og uttan iva vilja teir fegnir fáa munin millum liðini at verða størri, enn tey bæði stigini, sum hann er í dag.

Tvey leikbann

Og sum skilst á lagnum, so eru vónirnar hjá heimaliðnum heldur ikki ongar, nú GÍ kemur á vitjan. Eftir at tað eitt skifti sá heilt svart út hjá TB, hevur liðið spakuliga ment seg seinnu umførini, og tó at talan ikki er vorðin um meira enn tann eina sigurin, sum liðið vann í fyrsta umfarinum, so hevur tað í fleiri førum verið heilt nær við.

Einki leikbann ger seg galdandi hjá TB, har einasta ivamálið hóskvøldið var Bárður Dimon, sum hevur verið smáskaddur, men roknað verður tó við, at hann fær spælt.

Hjá GÍ er í øllum førum greitt, at hvørki Bartal Eliasen ella Magni Jarnskor verða á vøllinum sunnudagin. Teir fingu báðir sítt fimta gula kort í ár móti HB, og eru tískil leikbannaðir.

Hartil er eisini ivasamt, um Súni Friði Johannesen verður á vøllinum. Hann hevur ligið sjúkur hesa vikuna, og hóskvøldið var hann so framvegis ikki komin fyri seg.

Og boðini úr GÍ leguni eru greið. Dysturin hóskvøldið skal gloymast alt fyri eitt, soleiðis at leikararnir kunnu leggja fulla orku í landskappingardystin, har tað ikki eru ráð til fleiri mistøk, um GÍ skal halda vøkru hagtølini við europeiskari luttøku á hvørjum ári, við líka.



Gøtumenn mugu í øllum førum vera tveir týðandi leikarar fyriuttan, nú teir skulu royna at reisa seg eftir stórtapið í UEFA-Cup kappingini

Tølini tala

Tó at VB ofta hevur havt hug at arga HB í Gundadali, so hevur HB vunnið seks av teimum nníggju seinastu uppgerðunum millum liðini. Á Toftum hevur B36 funnið fimm ferðir á rað, eftir at teir annars ongan tíð høvdu vunnið á Svangaskarði fyrr enn í '97. Gøtumenn hava ofta havt tað sera trupult í Vági, og Klaksvíkingar hava enn fyrsta sigurin á Mølini til góðar.

Tað er so í øllum førum nakni sannleikin, sum hagtølini hava at bera um hetta umfarið í fyrstu deild. Veruleikin kann tó gerast ein heilt annar, men talvan niðanfyri sýnir so, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini sunnudagin havt hitst í tilsvarandi dystunum tíggju tey seinastu kappingarárini.

	'01	'00	'99	'98	'97	'96	'95	'94	'93	'92	Í alt	
EB/S-KÍ	4-2	-	-	-	-	-	-	2-2	-	-	1-1-0	6-4
TB-GÍ	-	-	-	3-1	-	0-3	1-0	3-5	1-1	0-3	2-1-3	8-13
B68-B36	0-2	1-3	1-2	2-3	0-3	1-0	2-0	0-0	0-0	0-0	2-3-5	7-13
HB-VB	2-1	2-2	2-0	5-1	1-2	1-2	2-0	-	2-0	4-0	6-1-2	19-8
Skála-NSÍ	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-	0-0-0	0-0